– Her klatrede man bare op uden kæde. Vi er nogle barske drenge vi færinger, ha?



SKJÓTTGANGANDI FERÐAVINNA. Hann er umstríddur og sjónligur í føroysku ferðavinnuni. Palli Lamhauge hevur verið við í nærum hálvthundrað ár. Í dag droymir hann um fleiri ferðafólk, størri bátar og dýrari bilettir

# Á pendulfe

*Dánjal Højgaard*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Klokkan er farin av tíggju, tá ið loyst verður frá landi hendan hósmorgunin.

Vit eru tilsamans 15 fólk umborð á skjóttgangandi skútuni hjá Palla Lamhauge í Vestmanna. Umframt myndamann og blaðfólk hevur eitt dansk ferðalag tekna seg til hesa ferðina, sum fer fram í fagrasta summarveðri.

Manningin á Silju telur tveir mans. Tað eru feðgarnir báðir Jákup Andrias, sum er skipari á ferðini og Palli sjálvur, sum er ferðaleiðari.

**Tøgn um kapping**

Silja smoyggir sær elegant uttanum kappingarneytan Barbaru, sum liggur og bíðar eftir ferðafólki við bátabrúgvarnar Inni á Fjørð. Longu áðrenn Jákup Andrias hevur fingið sett ferð á teir 750 hestarnar, sum fjala seg undir dekkinum á Silju, skilja vit, at kappingin er eitt viðbrekið mál í hesi vinnuni.

Hvussu vit enn tráðspyrja Palla, so vil hann ikki siga eitt einasta orð um kappingarneytan, Skúvadals-mennirnar. Ið hvussu so er ikki beinleiðis.

1999 var eitt metár til ferðafólk hjá Palla Lamhauge.

-Vit hava siglt støðugt fleiri fólk gjøgnum árini. Fjørárið var so nógv tað besta hjá okkum. Tá førdu vit eini 5.000 fólk undir Vestmannabjørgini og vit skulu ikki vænta, at talið verður so nógv størri, sigur Palli.

Tað ljóðar ikki so galið, tá hugsað verður um, at Palli Lamhauge hevur nógvar aðrar túrar eisini. Kortini letur hann illa at:

-Í mun til avrikið og íløguna gevur hetta alt ov lítið. Høvdu vit havt eini 14.000 fólk, so hevði mann liva av hesum. Men so nógv fólk fáa vit ikki, sigur Palli, sum sigur tað vera ótrúliga dýrt at reka bátsútferðir.

-Reklaman kostar og somuleiðis fólkini, sum tú samstarvar við, sigur Palli, sum heldur, at ein príshækking hevði broytt um støðuna.

-Høvdu vit kunna kravt 200 krónur fyri túrin so hevði tað verið øðrvísi. Men gera vit tað, bakka føroyingarnir út og so missa vit hinar gestirnar við, sigur reiðarin, sum greiðir frá, at tey flestu, sum fara undir bjørgini eru føroyingar og gestir hjá føroyingum.

Hann sigur tað ikki sjálvur.

Men millum reglurnar ber til at lesa, at hækkaðu báðir kapp-ingarneytarnir prísin í senn, so høvdu kundarnar kanska ikki rýmt kortini.

**Byrjaði í 1955**

Tá ið Slættanes er í eygsjón fer Palli út at afturdekkið at forklára. Á gøtudonskum greiðir hann frá teirri avtoftaðu bygdini norðast á Vágoynni. Fjáltur er eingin at hóma. Eftir nærum hálva øld í yrkinum virkar framførslan sum rein rutina.

Fyrstu ferð Palli fór at sigla ferðafólk eystur undir land var í 1955. Men tað var ikki fyrr enn í 1983, at siglingina gjørdist hansara høvuðsvinna um summarið. Palli trúði upp á hesa nýggju vinnu, sum var farin at taka dik á seg.

Fyrstu árini var stóri seksæringurin, Fríðgerð, einsamallur í flotanum hjá Palla, men í 1993 keypti hann sær ein 40 fót stóran rasarabát úr Svøríki.

Palli er errin av Silju, sum hann sigur var vald úr við størsta umhugsni. Báturin gongur 25 míl og skal vera ógvuliga sjógóður og léttur at manerera undir bjørgunum. Ein nýggjur bátur av hesum slagi kostar hálva triðju millión krónur, greiðir eigarin frá.

**Flís av livibreyð num**

Komin undir Vestmannabjørgini fáa ferðafólkini eina uppliving fyri tær 150 krónurnar, sum ein ferð undir Vestmannabjørgini kostar.

Tá síggja vit, at Halgisberg er lopið og at ein hola, sum Silja plagar at fara ígjøgnum er typt av omanlopinum. Sjógvurin er gráur og tað luktar av svávul.

Útlendsku gestirnir tykjast kortini rættiliga ónervaðir av dramatikinum, nú ein flís er farin av livibreyðnum hjá Palla. Palli sjálvur roynir at taka tað róligt:

-Men so segði Petur í Toftum: „man går i fare hvor man går“ skemtar hann. Men avdúkarí somu vend, at teir altíð hava eitt glas av nervatablettum standandi í bátinum.

Og tað er meira enn so komið fyri, at upplivingarnar undir bjørgunum hava verið so skakandi, at Palli hevur verið noyddur at givið fólki eina tablett at leggja undir tunguna aftaná.

**Umstrídd verkfallssigling**

Vestmannabjørgini eru ikki einasta álitið hjá Silju og Frígerð. Umframt teir almennu túrarnar verða leiguferðir gjørdar, bæði við ferðaløgum, kendum útlendskum gestum og fyri oljufeløg og skip.

Hendan siglingin er ein fortreyt fyri, at tað kann mala runt, slær Palli Lamhauge fast.

Palli er eisini kendur - og umstríddur - fyri at skjútsa fólk um Vestmannasund, tá ið tann almenna ferðslan liggur lamin av verkfalli. Sum hann sjálvur málber seg:

-Tað hevði verið ringt, um eingin Palli var.

Spurningurin er, um ferða-vinnan er so soltin biti, at Palli Lamhauge veruliga noyðist at ganga so vítt, sum at leggja seg út við føroysku fakfeløgini. Tí greitt er, at onkuntíð hevur leikað hart á millum partarnar.

-Eg eri ikki óklárur við nakran, tað veit guð. Nú haldi eg at tú gert nakað nógv av, skákar Palli sær undan.

-Nei, vit eru kammeratar. Teir vóru óalmindiliga fittir og plagdu at koyra meg heim til døgverða, tá ið verkfallið var, sigur hann og slær síðani málið frá sær:

-Nei, lat okkum snakka um okkurt annað.

**Tey kendu selja**

Ein plakat inni í stýrhúsinum á Silju fortelur um øll tey kendu fólkini, sum Palli og synirnir hava siglt millum ár og dag.

Millum teir forkunnugu gestirnar teljast Fríðrikur krúnprinsur, Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri, amerikanski sendimaðurin í Keypmannahavn og kendar stjørnur Kim Larsen, Hanne Boel, Sissel Kirkjebø og Bjørn Afzelius, sáli.



HYGG & HOYR

Fríggjadagur 19. mai

# Fylgir við veðrinum

*Seinastu árini er mnurin á summar- og vetrarskránni minkaður alsamt. Í hvussu so er, tá talan er um senditíð*

JÁKUP MØRK

Fyri fáum árum síðani var at kalla risastórur munur á skránni hjá Útvarpi Føroya, summar- og vetrarhálvuna.

Vetrarnar bar aloftast til at hoyra Útvarpið væl út á kvøldið, meðan summarið viðførdi eina ógvuliga skerda skrá. Fleiri vóru eisini tey, sum hildu, at hetta sum so ikki gjørdi nakað, tí tað var so nógv annað at takast við ljósu summarkvøldini.

Seinastu árini er tó ein stór broyting farin fram hesum viðvíkjandi. Summarhálvuna hevur verið sent allan dagin, og út á kvøldið. Onkur hevur kanska hug at samanbera við veðurlagið her á landi. Lítil munur er á summarinum og vetrinum, men tó, so eru dagarnir kortini nakað léttari at koma ígjøgnum í ljósu tíðini.

Heilt so umfatandi sum vetrarskráin, hevur summarskráin tó ikki veirð, og soleiðis verður eftir øllum at døma eisini í ár.

Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, sigur, at eisini í ár verður skráin nakað skerd um summarið. - Vit koyra við hálvari manning í einar 12 vikur, og tí hava vit ikki orku til at senda eins nógv, greiður hann frá.

Víðari sigur hann, at tey í løtuni eru í ferð við at leggja summarskránna til rættis, og hon verður kanska ikki heilt ólíkt teirri frá í fjør. Sosatt kunnu fólk rokna við, at talan aftur verður um eina seinnapartssending, sum allarhelst fær navnið summarið 2000.

Nakrar sendingar, sum hava verið at hoyrt seinasta hálva árið, fara í dvala komandi mánaðirnar, men útvarpsstjórin sigur tó, at fyri fyrst er avgjørt at koyra við so at siga óbroyttari skrá fram til fyrsta vikuskiftið í juni mánaði.

Hvussu sendiskráin kemur at síggja út eftir hetta, er so ikki greitt enn, men ivaleyst verður tó meira at frætta um hetta komandi tvær vikurnar.



ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

# Valdsnýtsla og -misnýtsla

Marna Jakobsen, exam. art., skrivar

Eg havi hugsað nógv um ta løgnu støðu eg eri komin í sum ummælari.

Eg eri borgari í einum landi, sum skal tryggja mær nøkur rættindi og skyldur. Eg havi loyvi at tala, skriva og hugsa sum eg vil. Hesi rættindi og skyldur eru grundleggjandi í einum og hvørjum demokratiskum landi, sjálvandi undir ábyrgd, tú hevur ikki loyvi at spilla nakran út ella koma við ósannindum, tí so verður tú revsað.

Hesi rættindi helt eg meg hava, til útvarpið 9 mei boðaði frá, at Føroya Løgting hevði viðtikið við lóg, at eg ikki skuldi vera limur í útvarpsnevndini, tí eg eri undir illgruna fyri at vera tjóðveldisfólk.

Jú meira eg hugsi um hetta, sum farið er fram í Løgtinginum, jú meira avgjørd eri eg í hugsan míni um, at hetta er eitt ógvuliga prinsipielt mál um rættin hjá fólki at sleppa at siga sína hugsan uttan at verða revsaði.

Eg veit meg ikki at hava gjørt nakað kriminelt, men hóast hetta meinar ein meiriluti í Føroya Løgtingi, at eg eri illgrunasom.

Søgan er hendan: eg fekk ein dagin telefonboð úr Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, har eg varð biðin um at gerast limur í útvarpsnevndini. Eg hugsaði við mær sjálvari, at mestur mundi tað vera, tí eg hevði ummælt loftmiðlar okkara eina tíð, tí eg annars eri lutfallsliga anonymur persónur. Eg játtaði.

So hugsaði eg ikki meira um hetta, til tað løgna hendi, at ein løgtingslimur ein dagin byrjaði at tosa um limirnar í fjølmiðlanevndini: teir áttu ikki at hava loyvi at vera har, tí at teir flest allir valdu Tjóðveldisflokkin.

Tað fyrsta eg hugsaði var: tað var løgið. Eg eri limur í valnevndini fyri Sands Kommunu, og er tað nakað, sum er grundleggjandi undir vali, so er tað hetta, at valið er persónligt og loyniligt, men á hesum løgtingsliminum ljóðaði tað, sum um hann hevði verið inni, saman við limunum í fjølmiðlanevndini, og hugt at , meðan teir valdu, tí hvussu kundi hann annars vita, hvat teir valdu?

Tað annað eg hugsaði var: hví gera so nógv hóvasták burturúr eini nevnd, sum ongan avgerðarrætt hevur yvir fjølmiðlunum, og sum ongar milliónir hevur at skalta og valta við?

Eg helt sannheit at siga, at hetta fór at fara aftur í ommu sína, hetta mundi vera ungi aldur løgtingslimsins, sum gjørdi hann so bráðræsnan.

Men eg fekk annað at síggja. Sum tíðin leið komu alt fleiri løgtingslimir við í kórið, ja, ein einmæltur Javnaðarflokkur tók undir við hesum persónligu útspillingum. Tá trúi eg, at eg doyði. Javnaðarflokkurin, sum hevur frælsi sum hægsta mál á skránni, tók undir við og stuðlaði hesum ørvitistosi.

Jú meira eg hugsaði um hetta, jú meira ódámligt tyktist hetta mær. Eg varð løgd undir at vera politiskt heft at ávísum flokki, hevði politiska slagsíðu og lítið trúvirði.Soleiðis kendi eg tað, tí eg var ein av limunum í útvarpsnevndini.

Hvat er hetta, man í roynd og veru ger seg til talsmann fyri? Jú Føroya Løgting hevur viðtikið at skerja frælsi hjá ávísum føroyingum, tí teir eru undir illgruna fyri at vera tjóðveldisfólk.

Eg sendi í mínum stilla sinni ein tanka upp til pápa mín, sum alt sítt lív valdi Javnaðarflokkin, og sum sjálvandi hevur ávirkað meg til at virða menniskju og rættindi teirra. Eitt, hann altíð legði áherðslu á, var ikki at gerast »hentur idiotur«, men at løgtingslimir Javnaðarfloksins skuldu gerast »hentir idiotar« fyri afturhaldskreftirnar, tað vardi meg ikki.

Tað, sum er hent nú, er, at Føroya Løgting hevur, við framferðarhátti og grundgevingum sínum, skapað fyridømi fyri at halda áfram við slíkum: Grundleggjandi prinsippir um persónligt frælsi fara á glið og hugsast kann, at næstu ferð taka enn fleiri løgtingslimir undir við slíkum atgerðum, tí hetta hevur jú verið gjørt áður. Slík framferð skapar eisini angist. Um tú hevur nakað at missa, t.d. eitt gott starv ella ynski um eitthvørt starv, so má tú halda kjaft og endiliga ikki siga tína hugsan. Stutt sagt: tú selur sál tína.

Tað grovasta av øllum hesum er, at alt hetta gongur fyri seg, uttan at fjølmiðlarnir umtalað hetta við einum einasta orði. Ikki ein einasta atfinning, bara endurgeving av tí sum fer fram. Hetta eru miðlar, sum skulu ganga undan at tryggja okkum talu- og skrivifrælsi.

Eg eri rætt og slætt í øðini: Hvat billa tit tykkum inn at revsa meg, tí eg játtaði embætismanni í Føroya Landstýri at vera limur í einari nevnd. Eg bað ikki um at vera nevndarlimur í útvarpsnevndini.

Hvat vistu tit løgtingslimir um orsøkina til mína játtan, tað kundi verið av áhuga, tað kundi verið av errinskapi, tað kundi eisini verið, tí at eg helt tað vera eitt slag av plikt, yvir fyri landsmyndugleikunum, at játta at vera við í slíkum arbeiði. Tað vistu *tit* so ikki.

So orsøkin til hetta løgna ummælið er, at eg til eina og hvørja tíð góðtaki, at Løgtingið hevur vald at lóggeva, men at eg ikki undir nøkrum umstøðum góðtaki slíka valdsmisnýtslu, sum her er farin fram.

Og ynski mítt til fjølmiðlarnar er, at teir fáa fingrarnar úr einum vissum staði, og eru uppgávu sína vaksnir.

ÚTsjón Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN